LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS

# Hjartakvikil
## (pacemaker)



Í hesum bóklingi eru upplýsingar til tey, sum fara at fáa hjartakvikil ísettan. Endamálið við bóklinginum er at upplýsa teg og avvarðandi tínum um viðgerðina, sum er fyri framman. Vit vóna, at bóklingurin svarar flestu spurningunum, sum kunnu stinga seg upp, og sostatt lætta tær um viðgerðina. Um tú hevur onkran spurning ella, um okkurt er ógreitt, eru starvsfólkini á Hjartadeildini altíð tøk at greiða frá ivamálum tínum.

## Hvat er ein hjartakvikil?

Ein hjartakvikil er eitt tól, ið stimbrar hjartasláttin. Orsøkin til, at ein hjartakvikil verður ísettur, er hon, at ólag er í leiðaranum til hjartað, ella at ein veikleiki er í tí náttúrliga kviklinum í hjartanum. (sí mynd)

Eitt av eyðkennunum fyri, at ólag er á hjartasláttrinum, er, at hjartað slær óvanliga seint ella, at hjartað steðgar á. Hinvegin hevur hjartakvikilin ongan týdning, tá ið trupulleikin er, at hjartað slær skjótt. Eitt av eyðkennunum, sum ein verður varug/-ur við, tá ið hjartað slær óvanliga spakuliga, er lyndi til at svíma, máttloysi, útlúgving og hjartakrampaherindi.

Undir viðgerðini verður hjartakvikilin settur inn undir húðina beint undir östbeininum. Sum oftast er tað høgrumegin. Stungið verður í eina bláæðr niðan fyri östbeinið. Síðan verða leiðarar úr kviklinum førdir inn í høgra forkamar og hjartakamar. Hjartakvikilin er minni enn ein svávuleskja, og battaríið, sum er í hjartakviklinum, brennir út eftir uml. 10 árum. Tá battaríið verður endurnýggjað, gongur tað fyri seg, sum tá ísetingin av hjartakviklinum var gjørd. Tú verður útskrivað/-ur samað dag, sum viðgerðin vard gjørd. Verður neyðugt at endurnýggja metaltræðrirnar inn til hjarta, verður tú útskrivað/-ur dagin eftir.

Viðgerðin verður gjørd á hjartatræðingarstovuni á sjúkrahúsinum og tekur uml. ein tíma. Í samband við hvørja skurðviðgerð, sum er, kann vandi verða fyri, at trupulleikar kunnu taka seg upp. Størstu vandarnir í hesum skurðviðgerðum eru luftsamling í bróstholuni, bløðing úr skurðsárinum og, at hjartað slær eyka sløg. Tað kann koma fyri, at leiðararnir úr hjartakviklinum førka seg. Um so er, verður tað neyðugt, at gera eina eykaskurðviðgerð.

## Fyrireiking

- Tekur tú blóðtynnandi heilivág, eitt nú Plavix ella Marevantablettir, er tað neyðugt at gevast við hesum, áðrenn skurðviðgerðin verður gjørd. Hetta verður gjørt í samráð við lækna.
- Tað er ikki loyvt at taka hjartamagnyl skurðviðgerðardagin.
- Teir sjúklingar, sum hava fingið endurnýggjað hjartalokurnar, skulu halda fram við at taka blóðtynnandi heilivág. Í staðin fyri blóðtynnandi tablettir verður givin ein blóðtynnandi sproyta, sum hevur somu árin sum Plavix ella Kovartablettir.

## Innskrivingarmiðstøðin: Fyrireiking

- Hav við allan tann heilivág, sum tú tekur dagliga
- Viðtala við sjúkrarøktarfrøðing og lækna
- Blóðroynd og røntgenmynd av lungum og hjartarit verða tikin.
- Skurviðgerðarøkið verður rakað vinstramegin niðanfyri östbeinið. (20 sentimetrar)
- Landkanning fyri bakteriur. (morgunland)

## Skurðviðgerðardagurin

Tú møtir á Hjartadeildini 14 G um morgunin samað dag, sum skurðviðgerðin verður gjörd. Tekur tú dagliga heilivág, verður tú biðin um at taka hann um morgunin, áðrenn tú fert heimanífrá. Tablettirnar, skulu svølgjast við bert einum munni av vatni. Plavix, Marevan ella Hjartamagnyl skulu ikki takast skurðviðgerðardagin.

- Fastandi frá midnátt kvøldið fyri skurðviðgerðina.
- Tú skalt fara í brúsu um morgunin sama dag, sum skurðviðgerðin verður gjörd.
- Ein plastnál verður løgd í eina æðr í vinstru hond/ handarbakið.
- Tú fært sissandi -og pínustillandi tablettir, og brunalinnandi heilivágur verður givin í æðrina.
- Skurðviðgerðarøkið verður rakað og sóttreinsað.
- Skart og skreyt og annað virðismikið stás skal verða eftir við hús.

## Skurðviðgerðin

Tú verður flutt/-ur á hjartatræðingarstovuna í einari song. Viðgerðin verður gjørd í staðdoyving (lokaldoyving). Ein lítil skurður verður lagdur niðan fyri östbeinið. Stungið verður í eina bláæðr niðan fyri vinstra östbein(stundum högra). Síðan verða hjartakvikilin settur inn undir húðina og førdur inn í høgra hjartarúm og hjartakamar. Skurðurin verður seymaður aftur við pentum, sum loysist upp av sær sjálvum.

Umvavið, sum verður lagt omaná skurðviðgerðarøkið er vatntætt, men ikki lufttætt. Umvavið skal takast av á Skurðambulatoriinum B3 umleið 7-10 dagar eftir skurðviðgerðina.

## Eftir skurðviðgerðina

- Tá tú ert heilt vakin, kanst tú byrja at drekka og eta aftur. Tað er umráðandi, at tú liggur á rygginum í umleið 4 tímar aftaná.
- Elektrodur verða settar á bringuna til at fylgja við hjartasláttinum
- Umráðandi er, at tú ikki lyftir armin uppum høvdið tí megin, sum skurðviðgerðin er gjørd (aloftast høgrumegin). Hetta er sera umráðandi tær fyrstu 4 vikurnar eftir skurðviðgerðina. Orsøkin er, at metaltræðirnir í hjartakviklinum kunnu førka seg. Dagliga er tað umráðandi, at tú brúkar armin tí megin, sum skurðviðgerðin er gjørd soleiðis, at handlið/ armur, albogi og fingrar ikki gerast stív.

## Útskriving

- Røntgenmynd verður tikin av bringuni. Hetta verður gjørt fyri at kanna, um metaltræðirnar úr hjartakviklinum eru rætt staðsettir. Hjartarit verður eisini tikið.
- Hjartalæknin kunnar teg um úrslitið av skurðviðgerðini, og nær tú skalt møta aftur til eftirkanning.
- Áðrenn tú verður útskrivað/-ur, verður hjartakvikilin stillaður og mátaður
- Vit mæla til, at tú bindur frið útskrivingardagin

Tú kanst byrja at arbeiða 7 til 10 dagar eftir skurðviðgerðina. Hevur tú tungt likamligt arbeiði, má roknast við longri sjúkrafráboðan. Minst til at biðja um sjúkraváttan, um tú tørvar hana. Næstu ferð, tú skalt møta til eftirkanning, fært tú eina váttan (patient identification card) við upplýsingum um, at tú hevur fingið ein hjartakvikil ísettan.

# Heimafturkomin

- Tað er í lagi at fara í brúsu, tí umvavið er vatntætt.
- Verður tú varug/-ur við, at skurðsárið verður reytt, hovnar, hitnar ella, at væta setir úr tí, er tað umráðandi beinanvegin at seta seg í samband við Skurðambulatoriið B3
- Verður tú varug/-ur við ólag í hjartanum, er tað umráðandi beinanvegin at seta seg í samband við Skurðambulatoriið B3
- Vit mæla til, at tú bindur frið tær fyrstu 4 vikurnar. Ansa eftir, at tú ikki lyftir tungt. Serstakliga er tað umráðandi, at tú ikki lyftir armin uppum høvdið tí megin, sum hjartakvikilin liggur. Hetta er sera umráðandi tær fyrstu 4 vikurnar.
- Tú kanst fara at svimja 4 vikur eftir skurðviðgerðina. Hetta verður gjørt í samráð við læknan.
- Tað er í lagi at brúka øll eldrivin húsarhaldstól.
- Tað er í lagi at brúka fartelefon. Tó er tað ráðiligt at halda fartelefonina umleið 7 sentimetrar frá hjartakviklinum.
- Trygdareftirlitið, t.d. á flogvöllum, ávirkar ikki hjartakvikilin, men tú skalt siga teimum frá, at tú hevur fingið ein hjartakvikil ísettan.
- Myndatøka (MRI) verður ikki framd hjá teimum, sum hava fingið ein hjartakvikil ísettan.
- At tú hevur fingið ein hjartakvikil ísettan, forðar ikki fyri, at tú kann arbeiða, íðka stimburfimi (aeorobics), lættari ítrótt ella gera húsarhaldsarbeiði eftir skurðviðgerðina. Eru trupulleikar við hjartakviklinum, tá tú íðkar ítrótt, er tað neyðugt at tosa við hjartalæknan. Viðhvørt kann tað verða neyðugt at stilla og máta hjartakvikilin. Hetta verður gjørt á Skurðambulatorinum B3
- Verður tú varug/-ur við eftirfylgjandi eykenni, er neyðugt at seta seg í samband við Skurðambulatoriið B3 ella við Hjartadeildina. Talan kann verða um møði, hovni um beinini/ fótleggirnar, øklarnar, lítil máttur, hjartakrampaherindi, lyndi til at svíma ella langtíðarhisti.

Omannevndu eykenni kunnu verða orsøkin til, at hjartakvikilin ikki arbeiðir, sum hann eigur.

Eru spurningar, ella er okkurt ógreitt, skalt tú ikki himprast við at seta teg í samband við starvsfólk á Hjartadeildini, sum altíð er til reiðar at ráðgeva um møgulig ivamál.

Telefonnummar á dagdeildini á Landspítalið við Hringbraut er 543 6031 og á Hjartadeildini 14 G 543 6420. Í Føroyum er tað Skurðambulatoriið, B3 telefon 504500 lokal 5400

Vit ynskjum um skjótan og góðan bata!

Starvsfólkið á Hjartadeildini

*Vinarliga hav í huga, at sjúkrahúsið ikki tekur ábyrgd av peningi ella øðrum virðislutum, so sum fartelefonum, teldum o.ø., sum sjúklingurin ella avvarðandi hava við sær.*

*Gevið gætur, at starvsfólk og næmingar á sjúkrahúsinum eru bundin at tagnarskyldu og hava tí ikki loyvi til at tosa við teg ella onnur um viðurskifti hjá sjúklingum á deildini. Tí heita vit á teg og tíni avvarðandi um ikki at tosa um tað, sum tit kunnu verða vitni til ella hoyra um aðrar sjúklingar á deildini.*




ÚTGEFANDI:
LANDSPÍTALI, LYFLÆKNINGASVIÐ I, HJARTADEILD 14G

HÖFUNDAR:
SIGRÚN RAGNARSDÓTTIR HJÚKRUNARFRÆÐINGUR
GIZUR GOTTSKÁLKSSON HJARTASÉRFRÆÐINGUR
ÁBYRGÐARMAÐUR:
KRISTÍN SIGURÐARDÓTTIR DEILDARSTJÓRI
ÞÝÐING:
MAJBRITT VESTERGAARD
RÁÐGJÖF OG YFIRLESTUR:
SIGURLAUG MAGNÚSDÓTTIR INNKÖLLUNARSTJÓRI
MARGRÉT VIGFÚSDÓTTIR LÍFEINDAFRÆÐINGUR
FANNEY SIGURÐARDÓTTIR HJÚKRUNARFRÆÐINGUR.

HÖNNUN:
KYNNINGARMÁL LSH/ÁJC




LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS